# Kvinnurnar hildnar fyri spott

*Eisini næsta royndin hjá KÍ og B36 at avgreiða seinnu hálvfinaluna í steypakappingini hjá kvinnum miseydnaðist. Orsøkin var enn einaferð, at ásetti dómarin hevði givið avboð til FSF, uttan at feløgini høvdu fingið boð um hetta*



JÁKUP MØRK

Tað gongur striltið at avgreiða steypakappingina hjá kvinnum.

HB kvinnurnar hava longu tryggjað sær annan sessin í finaluni, men hvat mótstøðuliðið verður, er ringt at fáa greiðu á.

**Dómaraóskil**

Eftir at KÍ hevði vunnið fyrru hálvfinaluna móti B36 4-3, fóru havnargenturnar fyri tveimum vikum síðani til Klaksvíkar at spæla returdystin.

Dysturin varð tó av ongum, tí dómarin, sum varð settur at døma dystin hevði givið avboð uttan at FSF hevði sett annan dómara í hansara stað.

Í seinastu løtu fekk KÍ fatur á einum lokalum dómara, men hendan vildu B36 genturnar undir ongum umstøðum góðtaka, tí tær vóru alt annað nøgdar við tað døming, sum hesin hevði sýnt tær báðar seinastu ferðirnar B36 var í Klaksvík.

Mikudagin varð so ein nýggj roynd gjørd, men eisini hendan miseydnaðist, orsakað av dómaratrupulleikum.

Hesu ferð hevði FSF sett nýggjan dómara, tá upprunaliga setti dómarin enn eina ferð hevði givið avboð, men hetta var ikki fráboðað feløgunum.

Tá B36-leikararnir sóu hetta, noktaðu tær blankt fyri at spæla. Talan var enn einaferð um lokalan dómara, sum tær undir ongum umstøðum vildu góðtaka í einum so týdningarmiklum dysti.

**Krevja óheftan dómara**

Sólvá Joensen, sum er liðformaður hjá B36, sigur, at tær als ikki kunnu góðtaka, at FSF setir ein lokalan dómara at døma ein dyst, sum er av somikið stórum týdningi fyri tær.

Fyrru ferðina tær vóru í Klaksvík, søgdu B36 genturnar, at einasti lokali dómari, sum tær kundu góðtaka í dystinum, var Lassin Isaksen, men hesin fekk tá ikki komið á staðið.

Seinnu ferðina kom Lassin á staðið, men tá høvdu B36 genturnar longu boðað frá,at tær ikki spældu, og tær vildu ikki fara uppøstar og øofyrireikaðar inn á vøllin.

**Dómararnir sleppa ov lætt**

Malena Jospehsen, sum er liðskipari hjá KÍ, er hørm um, at B36 genturnar ikki vildu spæla, nú Lassin royndi at koma við eini hjálpandi hond.

Hon er tó sannførd um, at størsti feilurin í hesum liggur hjá FSF.

- Tað vísur seg ferð eftir ferð, at domararnir sleppa alt ov lætt undan sínum skyldum, og at eingin dómari verður settur ísatðin, ella at feløgini ikki fáa boð um hetta líkist ongum.

Sjálv visti Malena av, at annar dómari varð settur, men hetta komst av, at dómarin ringdi til hana mikumorgunin, fyri at vita, nær dysturin skuldi spælast.

Harumframt greiða báðar frá, at tað tykist ivasamt, um leikararnir eru hugaðir at gera ein triðju roynd at fáa dystin avgreiddan. Talan er um dyst mitt í viku, og tí er neyðugt hjá leikarum at taka frí rá arbeiði, umframt at fleiri ganga til próvtøku í hesum døgum. Hetta ger sjálvandi støðuna hjá teimum enn meira ótolandi.

**Ikki eindømi**

Báðar vísa liðskipararnir á, at talan so avgjørt ikki er um nakað eindømi við hesum dysti.

*Enn er ikki fingin greiða á, hvat mótstøðuliðið hjá HB verur í finaludystinum*

Tá B36 í fjør var í Klaksvík, ,øtti dómarin ikki, men tað ferðina varð dysturin so avgreiddur við lokalari hjálp. Sum áður nevnt, so vóru B36 kvinnurnar ikki nøgdar við avrikið ta ferðina, og tí noktaðu tær fyri at spæla hesu ferð.

Sama skili var eisini galdandi, tá VB i fjør var í Klaksvík. Dysturin varð spældur, men misnøgdin við dómaran var somikið stór, at VB fekk tillutað nýggjan dyst.

Harufmramt er fleiri ferðir komið fyri, at lokalir dómarar døma dystir í bestu kvinnudeildini, og hetta eru leikararnir alt annað enn fegnar um.

**Ov fáir dómarar**

Óli Holm, sum er formaður í dómaranevndini hjá FSF sigur við Sosialin, at hann sjálvsagt er harmur um mistakið, og at FSF sjálvandi eigur alla ábyrgd av hesum.

- Møguliga eiga vit at eftirmeta um skpanina, sum verður nýtt, tá dómarar geva avboð, tí tað er eyðsæð, at hon ikki hevur riggað nóg væl í hesum førum, sigur Óli Holm, sum vísir á, at hann einki visti um trupulleikan fyrr enn í gjárkvøldi.

Óli leggur eisini dent á, at feløgini hava fingið eina umbering frá FSF, uttan at vit tó skulu gita um, hvat feløgini halda um hesa.

Um trupulleikan við lokalu dómarunum sigur hann, at hetta kemst av, at ov fáir dómarar eru at taka av.

Haann vísur á, at sama fyribrigdi eisini ger seg galdandi í 3. deild hjá monnum.

- At fáa fleiri dómarar at døma er ein stórur trupulleiki, men hendan trupulleika mugu feløgini hjálpa okkum við at loysa, sigur Óli Holm. Hann vísur á, at FSF sjálvandi ersinnað at skipa fyri neyðugum skeiðum og øðrum, men at tað mugu vera feløgini, sum eggja dómarum til at taka dómaraprógv.

Nær nýggjur dystur skal vera, er enn ikki greitt, men Óli Holm vísti á, at hetta verður upp til kappingarnevndina at gera av.

**B36 mótmælir**

Einki er at taka seg aftur í, at spælarar, venjarar og leiðsla í báðum feløgum eru í øðina inn á FSF í viðgerðini av hesum máli.

B36 sendi í gjár skriv til FSF, har greitt varð fra teirri misnøgd, sum handfaranin hjá FSF hevur elvt til í málinum.

Í brævinum verður víst til, at FSF eftir fyrra dystin gav lyfti um, at óheftur dómari skuldi setast at døma dystin, og at tær tí ikki kundu góðtaka dómaran, sum varð settur til dystin, enn tá uttan at geva nørkum liði boð um hetta.

Í seinasta reglubrotinum í skrivinum verður sagt, at hóast tær kenna seg hildnar fyri tað turra spott av FSF, eru B36 kvinnurnar sinnaðar at fara ein triðja túr til Klaksvíkar, treytað av at FSF kann tryggja teimum, at óheftur, kvalifiseraður dómari dømir dystin. Hetta hóast B36-kvinnurnar kenna seg hildnar fyri tað turra spott.

Sostatt eru helst útlit fyri, at seinni finaluluttakarin kortini verður funnin, men B36 kvinnurnar eru neyvan einsamallar um at kenna seg hildnar fyri spott í hesum máli.

# Andrew í Fokus

*Aftur mikudagin var tað meira enn nakar annar Andrew av Fløtum, sum gjørdi munin millum HB og mótstøðuliðið*



*Andrew leggur bóltin til vinstra bein sítt, og løtu seinni er HB a odda 1-0*

***Mynd: Álvur Haraldsen***

JÁKUP MØRK

7. mei, NSÍ-HB 1-1, Andrew av Fløtum javnar fyri HB

19. mei, HB-VB 2-2, Andrew av Fløtum javnar fyri HB

1. juni, HB-VB 6-2, Andrew av Fløtum skjýtur 4 av málunum hjá HB

4. juni HB-B68 3-4, Andrew av Fløtum leggur HB á odda 1-0

7. juni, FS Vágar-HB 0-2, Andrew av Fløtum skjýtur bæði málini hjá HB

**Sjálvsálitið**

Jú, av sonnum kann sigast, at maðurin við 10-talinum á rygginum hjá havnarliðnum hevur gjørt um seg seinastu tíðina.

Árið í fjør var hann í stóran mun darvaður av skaðum, og eisini í ár hevur hetta verið ein trupulleiki hjá honum, men skal dømast eftir yvirlitinum omanfyri, so er einki at ivast í, at hetta nú er lagt aftur um bak.

Eftir dystin móti vágamonnum mikukvøldið var Andrew enn einaferð maðurin í fokus, tó at hann kanska ikki sjálvur tóktist so greiður um hetta, tá vit hittu hann umborð á Ternuni. Vit spurdu hann, hví tað gongur somikið væl í løtuni:

- Hatta var sjálvandi ein deiligur dystur hjá mær, men eg dugi ikki at siga, hví tað gongur so væl júst nú. Kanska hongur tað saman við, at sjálvsálitið er í lagi.

**Ikki bert talent**

*Er hetta samstundis eitt tekin um, at tú ert um at blíva meira enn bara eitt talent, ella hvussu?*

- Tað hopi eg í hvussu so er at sleppa av við nú. Tað er eisini neyðugt hjá mær at vísa nakað nú, tí so nógvir av teimum gomlu leikarunum eru burtur.

*Er tað kanska eisini ein partur av frágreiðingini. Tað at tit nú eru noyddir at taka ábyrgd?*

- Ja, avgjørt. Vit kunnu ikki longur goyma okkum aftan fyri ein Una Arge ella Allan Mørkøre. Vit eru noyddir at átaka okkum nakað av ábyrgd sjálvir, og tá eg eri eldri enn álopsfelagarnir, er tað sjálvsagt, at eg noyðist at taka mín part av hesum.

Eg haldi eisini, at eg nú eri komin í hampuliga góða venjing. Tá eg byrjaði at venja aftur í vár, vigaði eg nøkur kilo ov nógv, men nú vit hava spælt so nógvar dystir innan stutta tíð, er hetta eisini um at koma í rættlag.

**Gleðir seg til grannauppgerðina**

*Hvussu verður so við leygardegnum. Ætlar tú eisini at skjóta mál tá?*

- Tað hevði í hvussu so er verið øgiliga stuttligt. Undir øllum umstøðum er tað ein dystur, sum eg gleði meg til, men samstundis er tað ein sera týdningarmikil dystur hjá okkum. Vinna vit, so er alt aftur púra opið í toppinum, meðan gloppið hinvegin verður 7 stig, um vit tapa dystin.

Dysturin í dag hevði tó eisini alstóran týdning fyri okkum, tí ein sigur í dag var so at siga grundarlagið fyri, at vit nú hava møguleikan at koma heilt fram í oddin.

*Og hvussu so við framtíðini. Hevur tú gjørt tær nakrar tankar í so máta?*

- Nei. Fyri fyrst royni eg bara at gera mítt besta her í HB. Áðrenn eg kann byrja at hugsa um útlandið, skal eg helst royna at skapa mær eitt navn her heima, so tað er als ikki nakað eg hugsi um.

Stutta samrøða okkara var nú komin at enda, men eftir prátið tykist tað greitt, at talan í løtuni er um ein leikara við stórum sjálvsálitið, uttan at hetta tó tykist ov stórt.

Verður hugburðurin framhaldandi hin sami í komandi dystunum, tykist tað í øllum førum ikki ósannlíkt, at klintranin upp eftir máltindinum heldur fram.



# Skrá fyri EM-endaspælið 2000

*Sum kunnugt fer EM-endaspælið í Hollandi og Belgia av barkastokki leygardagin, og komandi knappa mánaðin ella so verður helst átøkur einum marrudreymi hjá teimum, sum heldur vilja nýta sjónvarpið til at hyggja at einum góðum filmi heldur enn fótbólti.*

*31 dystir standa fyri framman, áðrenn nýggjur europameistari er funnin, og SvF hevur boðað frá, at teir vísa allar hesar, harav ikki færri enn 27 verða sendir beinleiðis. Niðanfyri hava vit prentað dystaryvirlitið til EM-kappingina, og kunnu lesararnir so fylgja við, hvussu gongst ymsu liðunum. Sjálvsagt ber eisini til at fylgja við hesum í ÍtróttaSosialinum og á alnetinum: www.sosialurin.fo*

## Bólkur A

Týskland
Rumenia
Portugal
Ongland

**Dystir:**

| | | |
|---|---|---|
| 12.06 | Týskland-Rumkenia | ___-___ |
| 12.06 | Portugal-Ongland | ___-___ |
| 17.06 | Rumenia-Portugal | ___-___ |
| 17.06 | Ongland-Týskland | ___-___ |
| 20.06 | Ongland-Rumenia | ___-___ |
| 20.06 | Portugal-Týskland | ___-___ |

## Bólkur B

Belgia
Svøríki
Turkaland
Italia

**Dystir:**

| | | |
|---|---|---|
| 10.06 | Belgia-Svøríki | ___-___ |
| 11.06 | Turkaland-Italia | ___-___ |
| 14.06 | Italia-Belgia | ___-___ |
| 15.06 | Svøríki-Turkaland | ___-___ |
| 19.06 | Turkaland-Belgia | ___-___ |
| 19.06 | Italia-Svøríki | ___-___ |

## Bólkur C

Spania
Noreg
Jugoslavia
Slovenia

**Dystir:**

| | | |
|---|---|---|
| 13.06 | Spania-Noreg | ___-___ |
| 13.06 | Jugoslavia-Slovenia | ___-___ |
| 18.06 | Slovenia-Spania | ___-___ |
| 18.06 | Noreg-Jugoslaivia | ___-___ |
| 21.06 | Jugoslavia-Spania | ___-___ |
| 21.06 | Slovenia-Noreg | ___-___ |

## Bólkur D

Frakland
Danmark
Holland
Kekkia

**Dystir:**

| | | |
|---|---|---|
| 11.06 | Frakland-Danmark | ___-___ |
| 11.06 | Holland Kekkia | ___-___ |
| 16.06 | Kekkia-Frakland | ___-___ |
| 16.06 | Danmark-Holland | ___-___ |
| 21.06 | Danmark-Kekkia | ___-___ |
| 21.06 | Frakland-Holland | ___-___ |

## Fjórðingsfinalur:

24.06 A1 __________ - B2 __________ ___ - ___

24.06 B1 __________ - A2 __________ ___ - ___

25.06 D1 __________ - C2 __________ ___ - ___

25.06 C1 __________ - D2 __________ ___ - ___

## Hálvfinalur:

28.06 V2 __________ - V3 __________ ___ - ___

29.06 V1 __________ - V4 __________ ___ - ___

## Finaludystur:

02.07 __________ - __________ ___ - ___